

# Amnesty: Óheft kanning av tilburðunum

Felagsskapurin Amnesty International hevur í almennum skrivi heitt á stjórnina um at gera eina óhefta kanning av tilburðunum sunnudagin, har ið minsta lagi átta persónar lótu lív. Sagt verður í skrivinum, at hendan kanningin ikki skal gerast av libanska herinum ella øðrum trygdartænastum, men skal vera neyv og har skal berast skjótt at, og so skal kanningin lúka altjóða treytir viðvíkjandi óheftni. Forsætisráðharrin Fouad Siniora kunngjørdi beinanvegin, at hendingarnar fóru at verða gjølla kannaðar. Sambært vitnum lótu einstakir úr libanska herinum skot av, men vitnir sóu eisini aðrar ókendum menn, lata skot av frá háhúsum nærhendis mótmælisgonguni. Nakrir mans vórðu handtiknir sama dagin, og mett verður, at teir eru undir illgruna fyri at hava skotið inní mótmælisgonguna frá háhúsunum. Men fjølmiðlarnar á staðnum hava einki fingið at vita um, hvørjir hesir eru.



*Libanska borgarakríggið er ikki gloymt, hóast lítið og einki alment kjak er um hesa myrku og óheiðurligu tíð hjá libanska samfelagnum. Leivdir av borgarakrígnum síggjast týðuliga í dagsins Libanon: politisk kreppa valdar og harðskapur tekur meiri um seg*

úr borgarasamfelagnum.
Ein trupulleiki sigst vera, at lærubøkur ikki greiða nøktandi frá krígnum, tess uppruni og fylgjur. Í eini gjøgnumlestri av 10 samfelagsligum skúlabókum, frá árum eftir 1990, verður borgarakríggið, um tað yvirhøvur verður nevnt, viðgjørt einans á yvirflatuni og tilvildarliga (t.d. við myndum av oyðiløgdum bygningum og ungdómum, ið rópa »nei til kríggj, ja til frið.«).

Tann eina bókin sipar, so at siga, til at søgan fyri libanar endaði í 1943, tá ið Libanon varð stovnað – eftir ´43 verða hendingar, og serliga bardagar, næstan ikki nevndar. Harafturat, stendur skrivað í tí einu bókini, at »samveran í Libanon ongantíð hevur verið betri« og, at »Libanon er eitt tolsamt samfelag, hvørs borgarar trívast og liva sum brøður.« Hetta er at fara skeivur av veruleikanum, sum hann hevur víst seg seinastu árini og serliga síðan seinasta vikuskifti.

## Eingin sannleika-dómstólur í Libanon

Í Libanon hevur mann ikki, eins og t.d. í Suður Afrika, havt sannleikadómstólar, har krígsbrotsverk og illgerðir hava verið viðgjørdar. Undir libanska borgarakrígnum hvurvu 17.415 persónar. Og enn í dag spyrja fleiri seg sjálvan hvagar hesir eru endaðir. Og fleiri av oddamonnunum í mongu herliðunum, sum bardust tá, hava sitið gjøgnum 90ini og sita enn í dag á ovastu politisku sessunum. T.d. verður hetta umtalað í einum filmi frá 2000, »In the Shadows the City«, sum finst serliga nógv at oddamonnum. Í filminum er eitt petti, har ein bólkur av kvinnum heldur eitt mótmælistiltak uttanfyri høvuðsstøðina hjá eini herdeild, og hetta er seint undir borgarakrígnum. Kvinnurnar ganga og vísa fram myndir av synum og monnum, ið eru horvnir undir borgarakrígnum. Tann eini leiðarin, sum í 90unum kom at sita á einum týðandi statsligum sessi, kemur út og biður tær fara heim at ansa eftir børnunum og lata fortíðina fara.

Libanska tjóðartingið tók í august 1991 ítøkilig stig til, at samfelagið skuldi gloyma borgarakríggið og halda á fram, sum um lítið og einki var hent. Fyrrverandi herdeildarleiðarar komu í tingið og ein almenn amnesty var kunngjørd, galdandi fyri allar brotsgerðir, ið høvdu við kríggið at gera. Einasti herdeildarleiðarin, ið var settur fyri ein dómstól í samband við borgarakríggi, fekk amnesty í 2005.

Komandi tíðin verður serliga avgerandi fyri libanar. Dirvi skal undir øllum førum til fyri at trína fram og siga sonnu libansku søguna, eins og høvundurin Elias Khoury eftirlýsti. Men undir núverandi umstøðum (sí stubba omanfyri) er tað helst ov seint til at slíkt fer at gera mun.

## Fakta

- Lýðveldið Libanon, stovnað í 1943.
- 93 % av libanum hava arabiskt sum móðurmál. Muslimar 54 % (shiamuslimar 34%, sunnimuslimar 20%), Kristin 36%, drusar 8%.
- Ofta lýst sum eitt »trúarsamfelagsligt lýðveldi« orsakað av samansetingini av fólkabólkunum í samfelagnum, og ikki, eins og hini arabisku lýðveldini – Sýria, Egyptaland, Yemen og Libia – sum eitt »sosialistisk« lýðveldi.
- Libanska borgarakríggið fevndi um allar týðandi partarnar í samfelagnum. Grannarnir, Ísrael, Sýria og palestinar, vóru eisini virknir í stríðnum, ofta í samstarvi við libanskar partar. Tøl frá 1992 siga, at tils. 144.240 fólk doyðu.